# Minningarorð

15. mars 2009 doyði Óli Berg, lærari, brádliga bert 57 ára gamal.



Óli var føddur 20. september 1951. Hann var sonur Onnu Sofíu f. Djurhuus úr Sumba og Dánjal Jákup Berg úr Nesi í Hvalba.

Óli vaks upp í Nesi. Har gekk hann eisini í skúla fyrstu árini av síni skúlatíð og í 6. og 7. flokk í Hvalbiar skúla. So gekk leiðin víðari. Fyrst til Tvøroyrar og síðani til Hoydalar har hann tók realprógv í 1969.

Sum so mangur unglingi á bygd tá í tíðini, fór Óli til skips nøkur ár, men hóast honum dámdi sjólívið, fór hann á Føroya Læraraskúla í 1972, og hagani tók hann prógv í 1977.

Óli arbeiddi á Venjingarskúlanum í tvey ár, men so gekk leiðin aftur til heimbygdina, tí í 1979 fekk hann starv í Hvalbiar skúla, og her arbeiddi hann, til hann doyði.

Óli var dugnaligur lærari. Støddfrøði, alis- evnafrøði og søga vóru hansara lærugreinir, men hann átók sær eisini at undirvísa í øðrum lærugreinum, um tørvur var á tí.

Næmingarnir dámdu Óla. Teir vistu, at frá honum fingu teir haldgóða undirvísing, og í hansara tímum var arbeiðsfriður.

Millum starvsfelagarnar var hann álitismaður. Hansara orð høvdu vekt.

Í nógv ár var Óli formaður í lærararáðnum og seinni skrivari í námsfrøðiliga ráðnum í Hvalbiar skúla.

Hann var skrivari í Hvalbiar kommunu frá 1986.

Við hesum starvinum fylgdu fleiri álitispostar, sum Óli røkti til fulnar.

Eisini í sínum starvi í Hvalbiar kommunu var Óli álitismaður og góður í ráðum, og mong vóru tey, sum leitaðu sær ráð hjá honum í samband við ymisk lokal mál.

Óli giftist í 1977 við Honnu f. Jacobsen úr Tórshavn. Tey eiga tríggjar synir. Dánjal Jákup, Magnus og Jens Paula. Eina abbadóttir, Honnu Sofíu, fekk Óli, áðrenn hann nú legði árarnar inn, og tey bæði vóru sum lív og ein sál. Hon var av og á við abbanum í skúla, og har sóu vit eina aðra síðu av Óla, eina bleyta og familjukæra.

Óli átti jørð saman við beiggja sínum, Esmari, og í síni frítíð fekst Óli við seyð. Hann kendi seyð. Henda áhugan hevði hann frá mammu síni, Onnu.

Í hoygging, á fjalli og í fletting legði hann nógv fyri. Hetta er tungt arbeiði, men Óli var sterkur og arbeiðssamur.

Men tá ið lombini koma aftur í vár, verður tað ikki Óli, sum, sum vant, markar tey. Óli dugdi at læra frá sær. Synirnar setti hann við. Hann setti ikki tóma tægu eftir seg

Eitt tómt pláss stendur eftir Óla Berg í Hvalbiar skúla. Vit syrgja og eru skakaði. Men tá vit so við og við reiðiliga gerast greið yvir, at hann, sum so sjáldan var burtur frá skúlanum, ikki kemur aftur, tástani fara vit at skilja, hvussu stórur missurin veruliga er.

Vit hava samkendslu við tykkum í Nesi, nú tit hava mist mann, pápa, son, verfaðir, abba og beiggja. Má Harrin styrkja tykkum hesa sváru tíð.

At Óli Berg var væl kendur og virdur millum manna, bar tann stóri skarin ,sum fylgdi honum út á Leiribø, boð um.

Vit vilja enda hesi minningarorð um Óla Berg við yrkingini "Lívið" hjá Pól F. Joensen

*Lívið er eins og eitt kertuljós,*
*ið brennur bert stutta tíð,*
*men áðrenn tað slóknar, eitt annað er*
*tendrað við tí av ný, -*

*Tendrast og slókna er lívsins lóg,*
*alt lív bert eittans er :*
*hin ævigi tendrarin lívslystin er,*
*sum gjøgnum alt streymandi fer.*

Við hesum lýsa vit frið yvir minnið um Óla Berg, ein góðan starvsfelaga og lærara.

**Starvsfelagarnir í Hvalbiar skúla**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ellen Maria Winther**, fødd Nielsen, í Vági, ættað úr Vestmanna, andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi sunnudagin, 89 ára gomul.

**Dánjal Jóhan Hjelm úr Vági**, vanliga nevndur Dallahann hjá Torvaldi, andaðist sunnudagin á Suðuroyar sjúkrahúsi, 74 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13.30 úr Bethel.

**Thomasia Niclasen,** vanliga nevnd Masa, ættað frá Gjógv, búsitandi á Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi sunnudagin, 76 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Klávus Sólheygg**, vanliga nevndur Jave, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týskvøldið kl. 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mikudagin 1. apríl kl. 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæri maður, pápi, sonur og bróðir

**Árni Debess**

andaðist og varð jarðaður.
Hjartans tøkk til tykkum øll fyri troyst og stuðul í stóru sorg okkara, somuleiðis tøkk til manningar á Brimli og Tjaldrinum.

Við vón um gleðiligar páskir og bestu heilsanir.

**Carol, Rúnar og Sára**
**Anny, Hansemann og systkin við familjum**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá okkara elskaða mamma, vermamma, og omma

**Poula Mohr**
Fuglafjørður

doyði og varð jarðað.
Hjartans tøkk til tykkum øll, ið vóru um hana til tað síðsta, og takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Hans, Poul Jákup og Øssur**

**90 ára føðingardagur**
Miebeth Jacobsen av Kirkju, búsitandi á Sambýlinum á Heygnum, undir Kráarbrekku, Klaksvík, fyllir 90 ár mikudagin 1. apríl. Høvi verður at heilsa upp á hana á Sambýlinum frá kl. 15 til 18.

**Brúdleyp**
Leygardagin 4. apríl giftast Elin Maria Iversen og Rógvi Róin, Hoyvík. Vígslan verður í Havnar krikju kl. 16.00. Brúdleyp verður fyri innboðin á Hotel Føroyum.

**Brúdleyp**
Pálmasunnuudag 5. apríl kl. 14.00 giftast í Ebenezer, Tórshavn: Elin Kathrina Haraldsen, Argir og Jens Sofus Thomsen, Hvalba. Aftaná vígsluna verður reseptión, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.30.

**Brúdleyp**
8. apríl giftast í Keypmannahavn Stine Dobak Jensen, Oslo, og Tummas Planck Reinert, Tórshavn. Adressan er Øre sundsvej 92, 2 th., 2300 København S.

**Brúdleyp**
Mikudagin 8. apríl giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík kl. 16 Sigrid Mikkelsen og Niels Juel Arge. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.




**Dagurin**
**31. mars. Balbina**, deyð umleið ár 120. Navnið var við í teimum fyrstu føroysku álmanakkunum, men er síðan lagt burtur. Hon var dóttir rómverska hermannin Kvirinus og bleiv tikin av døgum saman við pápanum. Sverri Dahl, fornfrøðingur, varð føddur í Tórshavn hendan dagin í 1910.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

